

## Lættari flogsetur

Allir steinar verða vendir, nú flogfeløg um allan heim royna at finna hættir at spara olju uppá. Seinast hevur Lufthansa gjørt av, at øll setrini í flogførum teirra skulu skiftast við nøkur úr serliga løttum tilfari. Átakið verður mett at spara felagnum 5.000 tons av olju um árið. Aðra staðni hevur US Airways tikið videoútgerðina úr øllum innanríkis flogførum, og hjá Sterling eru øll gólvteppi í flogførunum skift út við teppi úr lættari tilfari.

## 50 kilometrar av spam

TDC, sum hevur á leið 1,5 milliónir internetkundar, sigur, at teirra spam-filtur í ár forðar á leið 6,5 milliardum spam-postum at røkka brúkarunum. Hendan mongdin er somikið stór, at vórðu fangaðu spam-postarnir fyri ein mánað printaðir út, varð bunkin heilar 50 kilometrar høgur.

# pínubonkin

ryggin, tá ið tit fráboðað uttan um hann, at tingbólkurin tekur undir við tunnilssemjuni.

- Vit stinga avgjørt ikki Gerhard Lognberg í ryggin, tí Sandoyartunnilin hevur ongantíð verið so nær sum hann er nú og hendan semjan er so góð, sum hon fær verið.

John Johannessen sigur tvørturímóti, at eftir hansara tykki, hevur tingbólkurin hjá Javnaðarflokkinum havt ómetaliga gott tol við Gerhard Lognberg og víst hon stórt trúfesti.

- Eg sakni, at tað eisini gongur hinvegin.

- Men tað ber ikki til at vit ganga í tveimum og tí vil eg hava greitt svar frá Gerhard í næstu viku, tí eg vil hava greiði á, hvussu nógv, eg skal telja upp í, tá ið tingmanning Javnaðarfloksins skal teljast saman og vit skulu finna útav grundarlagnum undir samgonguni, sigur John Johannessen.

John Johannessen staðfestir, at tað hevur avgerandi týdning, at tunnilsmálið fæst aftur um og endaliga avgreitt so at samgongan kann fara í holt við onnur stórmál, sum ríða samfelagnum, eitt nú hækkandi renta, dýrkandi olja og matur, minni fiskur og so víðari.

### Sandoyartunnilin nærri enn nakrantíð

Annars váttar John Johannessen, at javnaðarflokkurin á tingi tekur undir við tilmælinum hjá tunnilsbólkinum hjá samgonguni.

- Við hesi semjuni í tunnilsbólkinum er Sandoyartunnilin komin nærri enn nakrantíð, men samstundis verður atlit tikið at búskaparligu støðuni.

- Eftir avtaluni skal partafelagið Sandoyartunnilin stovnast longu í næstu tingsetu. Samstundis er avtalan at skjóta 50 milliónir í partafelagið um árið tað er eitt stórt og avgerandi stig fram ímóti at fremja ætlanina.

Men beint nú vil ikki hongja seg í, hvør tunnil skal gerast fyrst, tann í Eysturoy ella tann í Sandoy.

Annars staðfestir hann, at endamálið er, at farast skal undir Sandoyartunnilin, tá ið fíggjarlógin í 2011 er samtykt.

- Men sjálvandi mugu vit eisini taka øll teknisk og búskaparlig fyrilit. Talan er um heimsins longsta undirsjóvartunnil og tí ber ikki til at rista eina loysn úr ermuni og tí skilji eg landsstýriskvinnuna í vinnumálum væl, tá ið hon ikki treytaleyst vil binda seg til eina dagseting fyri, nær farast skal undir Sandoyartunnilin, sigur John Johannessen.

Hann vil heldur ikki í eitt kjak um, hvør tunnil skal gerast fyrst, tann í Eysturoy ella tann í Sandoy.

### FAKTA

Við hesi sjáldsama stuttu, men eisini sjáldsama greiðu fráboðan í gjár, ger Javnaðarflokkurin sína støðu greiða í spurninginum um undirsjóvartunlarnar.

**Fráboðanin er soljóðandi:**

Góðu fjølmiðlar!

Tingbólkur Javnaðarfloksins tekur undir við tunnilssemjuni.

*Vinarliga*
John Johannessen,
Form.

# Míni egnu stinga meg í ryggin

**Eg eri bæði til reiðar at fara úr tingbólkinum og úr samgonguni, tí fráboðanin frá Javnaðarflokkinum í dag er ein knívur í ryggin, sigur Gerhard Lognberg**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er ein knívur í ryggin á mær.

Gerhard Lognberg er bæði vónbrotin og fortørnaður um, at formaðurin í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum nú alment hevur boðað frá, at Javnaðarflokkurin á tingi tekur undir við tilmælinum hjá tunnilsbólkinum hjá samgonguni.

- Eg skilji ikki, hvussu tingbólkurin kann koma við eini fráboðan sum hesari, tí vit hava ongantíð havt fund um málið, staðfestir Gerhard Lognberg.

- Sjálvur eri eg í tingbólkinum, men ongin í Javnaðarflokkinum hevur so mikið sum tosað við meg um tilmælið hjá tunnilsbólkinum, uttan Mikkjal Sørensen, sum sat í bólkinum og sum ringdi at boða mær frá, at hann hevði góðtikið tilmælið.

### Skal fegin gjalda prísin

Gerhard Lognberg endurtekur enn einaferð, at hann tekur ikki undir við tilmælinum fyrrenn ein beinleiðis dagur er ásettur fyri, nær farast skal undir Sandoyartunnilin.

Og hann staðfestir, at hann fer ikki at lata seg kroysta til at taka undir við tilmælinum, tí tað ger hann ikki.

- Takið eg undir við hesum, stingi eg bæði Sandoynna og Skúvoynna í ryggin, bara fyri ein tingsess og tað havi eg ikki samvitsku til , sigur Gerhard Lognberg.

Sum tað sæst í greinini á síðu átta, fer javnaðarflokkurin at hava fund við teg í næstu viku, har tey krevja greitt svar um tú tekur undir við tilmælinum. Hin møguleikin er, at tú framvegis heldur fast um at vraka tilmælið og sostatt setur teg sjálvan uttanfyri bæði tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum og samgonguna.

- Tey skulu sanniliga fáa eitt greitt svar frá mær og tað er, at eg taki ikki undir við tilmælinum.

- Er hetta treytin fyri at vera við í tingbólkinum og í samgonguni, skal eg fegin offra bæði tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum og samgonguna fyri Sandoyartunnilin.

- Eg taki ikki undir við tilmælinum, so skal eg heldur koyrast úr bæði tingbólki og samgongu.

Hinvegin leggur hann dent á, at hann fer ikki at melda seg úr Javnaðarflokkinum, tí tað eru mong javnaðarfólk, sum stuðla mær.

Men ert tú ikki bangin fyri, at treytaleysa støða tín fer at hava tað avleiðing, at alt dettur niðurfyri?

Nei, tað eri eg ikki, tí vit hava framvegis eina lóg í gildi sum sigur, at farast skal undir Sandoyartunnilin 1. november næsta ár.

- Var nakar vilji at fara undir Sandoyartunnilin, kundi samgongan sum einki sett eina dagseting á, um tað so ikki var fyrrenn síðst í 2010 ella fyrst í 2011, tí tað hevði eg kunnað góðtikið.

- Skal eg taka undir við tunnilssemjuni, er avgjørda treytin, at dagur verður ásettur, so at tað verður í valskeiðnum hjá hesari samgonguni, at farið verður undir Sandoyartunnilin og tann støðan vikast ikki, staðfestir Gerhard Lognberg.



*Javnaðarflokkurin og samgongan skulu sanniliga fáa eitt greitt svar frá mærog tað er, at eg taki ikki undir við tilmælinum. So skal eg fegin betala prísin, sigur Gerhard Lognberg*